# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*28. desember fingu Lis og Rókur í Jákupsstovu, Toftir, ein son. Hann vigaði 3365 gr og var 51 cm langur.*



*17. november 2005 fingu Susanne Corell og Bárður Anthoniussen, Slagelse eina dóttur. Hon vigaði 3540 gr. og var 52 cm. long.*

11. desember fingu Annika og Magni Berg, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3450 gr.

22. desember fingu Emmy Haraldsen, Sørvágur og Sune Grønnebæk, Keypmannahavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3628 gr.

23. desember fingu Krista Gram Olsen, Tórshavn og Kim H. Sørensen, Hobro, búsitandi í Århus, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3190 gr.

27. desember fingu Anni Midjord og Sigtór Ottósson, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3830 gr.

27. desember fingu Elin Maria Iversen og Rógvi Róin, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3400 gr.

27. desember fingu Olga og Jákup av Kák, Argir, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4350 gr.

29. desember fingu Fía og Steinfinn Várlíð Jacobsen, Fuglafjørður, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3775 gr.

30. desember fingu Annika og Elvi Joensen, Søldarfjørður, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3800 gr.

31. desember fingu Ása Dam og Rúni Weihe, Tromsø, ein son. Hann var 49 cm. langur og vigaði 3300 gr.

31. desember fingu Jonna Joensen og Johan Johannesen, Nes, Eysturoy, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3980 gr.

31. desember fingu Olanta og Eskild Borðbúð, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4075 gr.

31. desember fingu Poul Juul og Berit Vilhelmsen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4000 gr.

2. januar fingu Cecilia og Jógvan Heinesen, Hellerup, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4050 gr.

2. januar fingu Tina Tórarenni og Jóannes Johannesen, Argir, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3600 gr.

2. januar fingu Connie Reinert og Finnur Hansen, Kollafjørður, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3100 gr.

2. januar fingu Randi Magnussen og Bergur Eliasen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3900 gr.

2. januar fingu Jastrid á Dalbø og Sofus Gregersen, Fuglafjørður, ein son. Hann var 49 cm. langur og vigaði 3120 gr.

3. januar fingu Joan og Alexandur Abrahamsen, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3350 gr.

3. januar fingu Eyðvør Løkjá og Robert Jensen, Skáli, tríburar - dreingir. Tann eini var 49 cm. langur og vigaði 2690 gr. og hin var 48 cm. langur og vigaði 2190 gr.

5. januar fingu Durita Hilduberg og Janus Poulsen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4680 gr

6. januar fingu Tórun Hansen og Hans Andreas Midjord, Toftir, ein son. Hann var 52,5 cm. langur og vigaði 3750 gr.

7. januar fingu Gunvør og Dánjal Jacobsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4170 gr.

8. januar fingu Herdis og Ingi Hofgaard, Froðba, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3700 gr.

10. januar fingu Miriam Solmunde og Jón Tórur Holm, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3130 gr.

## Prógv

Tann 6. desember 2005, var Kristian Midjord úr Hvalba, avlærdur sum elektronikfakteknikari. Hann hevur lært hjá Radiometer Medical.

Tórshavnar býráð, Snarskivan:

# Úr myndasavni Williams



*Zakarias Heinesen, listamaður, á fotoframsýningini við eina mynd av foreldrunum Elisu og William Heinesen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Hósdagin 12. januar læt ein fotoframsýning upp í Snarskivuni í Havn við fotomyndum úr privata myndasavninum hjá Williami Heinesen. Framsýningin hongur uppi til 12. mars**

FRAMSÝNING

Mentamáladeild Tórshavnar býráðs og Tórshavnar Býarsavn skipa í hesum døgum fyri einari sera áhugaverdari fotoframsýning í Snarskivuni í Havn.

Í sambandi við 90 ára føðingardag William Heinesens í 1990 skipaði Tórshavnar Býarsavn fyri eini framsýning í Ydun á Høgareyni at heiðra okkara kendasta havnarborgara nakrantíð. Framsýningin fór seinni til Íslands og varð sett upp í Norðurlandahúsinum í Reykjavík.

Fotomyndirnar eru úr privata myndasavninum hjá Williami Heinesen, og tær flestu eru frá 1930-árunum, tá ið Elisa og William settu búgv á trøðni undir Varða, og William av álvara var farin at gera vart við seg sum rithøvundur.

Eisini eru myndir frá barnaárum Williams fyrst í 20. øld, sum vísa skyldfólk hansara í Havn um hetta mundið. Aðrar myndir seinni í øldini eru av vinfólkum hansara. Nakrar myndir eru av Williami á ellisárum seinast í 1980-árunum.

Finnur Johansen, sum var býarsavnsvørður, lænti tær hálvthundrað svørt/hvítu myndirnar frá soni Williams, Zakariasi Heinesen, til framsýningina í 1990, og hesaferð hevur Finnur aftur rætt eina hjálpandi hond.

Framsýningin er opin í vanligu upplatingartíðini hjá Snarskivuni, mánadag - fríggjadag kl. 9-16, tó hósdag kl. 9-18. Framsýningin hongur uppi til 12. mars.

Doris í Dali, Kvívík:

# 25 ára starvsdag í Miklagarði



*Doris í Dali hevur arbeitt hjá slaktaranum í Miklagarði í SMS í 25 ár*

Leygardagin 14. januar 2006 hevur Doris í Dali í Kvívík 25 ára starvsdag hjá slaktaranum í Miklagarði í SMS í Havn.

Doris sigur, at hon hevur trivist sera væl, og Miklagarður er eitt gott arbeiðapláss í allar mátar við góðum samstarvi millum starvsfólk og leiðslu.

Hjá slaktaranum eru tilsamans 17 starvsfólk.

Doris er úr Kvívík, dóttir Kristinu og Erling Davidsen. Hon er gift Jens Paula í Dali úr Havn.